


www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 08 - 2012

# Thor nógv frálandavirksemi í Afrika

Skipini hjá felagnum THOR eru sera upptikin í Vesturafrika fyri tíðina. Felagið hevur leingi arbeitt væl saman við fleiri seismikkfeløgum og eru í løtuni fimm av skipunum í frálandavinnu út fyri Angola. Hesi skip eru - Tórsvík, Thor Alpha, Thor Provider, Thor Beamer og Thor Pioneer. Tey koma at arbeiða út frá Angola meginpartin av hesum árinum skrivar Thor á heimasíðu síni. Eisini Thor Assister og Thor Server verða gjørd klár til at fara ávikavist til Kongo og Tanzania. Hesi skip hava arbeitt í norðurhøvum í summar men fara aftur til Afrika, nú seismikkskjótingin um okkara leiðir fer at minka, tí heystið nærkast. Felagið ger í stóran mun nýtslu av føroyskum tænastuveitingum, og nú hesi skip koma til Føroya í vikuni verða fleiri umvælingar gjørdar, m.a. skal Thor Assister í dokk hjá Mest á Skála.